# EIN KASTALI ER FALLIN

## sleysi verji teirra veiku




*Kyndil í dysti móti danska liðnum Århus KFUM. Finnur uttastur til høgru í myndini*

landsstýrið tók við í 98, kom Finnur á ting fyri Høgna Hoydal, sum gjørdist varaløgmaður um tað mundið, táið føroyingar høvdu sett á skrá ítøkiligar ætlanir um at skipa nationalstatin.

Hann stillaði ikki uppaftur í 2002, men á valinum í 2004 varð hann umdømisvaldur tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, og tað er ikki at taka seg aftur í, at hann í flestu førum hevur verið sosiali profilurin, lívsjáttandi tærið, sum megnaði at seta kvalifiseraðu spurningarnar og at seta fram skikkaðu uppskotini, og var maðurin sum gjørdi tað roysnið, at flokkurin varð umboðaður í øllum litbráum. Og hóast hann kundi tykjast nakað harðrendur viðhvørt, við sínum stutta fjúsi, so var sálin bleytari enn smør, hjartatræðirnir so moyrir og hartil hevði hann tey vælsignaðu evni, ikki at eiga lut í tí, at vera ímyntur. Táið uppgangurin var farin og líkindini aftur vóru batnað, var hann aftur hin sami, tað sum var farið var farið. Ein dygd táið tú ferðast millum so viljafastar og ymiskar personasjur, sum altíð vilja vera savnaðar í einum parlamentariskum forum sum Føroya Løgtingi.

Finnur var aktivur kjakari og ákoðanarmyndari. Skjótur á avtrekkjaranum. Góður skribentur. Kvikur í hugsan. Við hesi barlastini hevur hann einsamallur og saman við øðrum givið hópin av bókum út, serliga um fótbólt, og í mong Harrans ár var hann ítróttarredaktørur á Oyggjatíðindum, onkuntíð kulturredaktørur, sum vit av og á plagdu at arga hann við, táið vit høvdu eina lagaliga løtu og brúktu hana til at skjóta eftir hvør øðrum í speisemi. Ikki tí, hann var sera áhugaður í føroyskum mentanarstrevi og starvi. Í Útvarpinum hevur hann í mong ár verið viðmerkjari og medkommentator, og tað eru fleiri sum halda, at hann sum ítróttarskrivari hevur verið høvdið frammanfyri aðrar, táið tað snýr seg um at skilja tað, sum fyriferst á leikvølli. Alt annað skuldi nú eisini verið løgið, uppvaksin sum hann var, hjá næsta granna, sum var gamla fótbóltsplenan í Gundadali. Og so var hann eisini partur av tí ættarliðnum hjá HB, sum framvegis sigst liva í tí sáligu trúgv, at teir ongantíð verða yvirhálaðir í kvaliteti og bóltsnildi. Onkur er ósamdur í hesi tesu, men hetta var helst, sum kollektiv, tað mest nýskapandi liðið føroyingar hava átt í nýggjari tíð.

Í mong ár, kanska serliga hesi seinastu, fekst hann nógv við at fylgja gongdini hjá yndisfelagnum Chelsea, og tað hevur verið rímiliga hugaligt hesi seinastu árini, síðani russiskur einskiljingarkapitalur fór undir at fíggjað kollosala uppkeypið av stjørnum víða um heimin. Onkuntíð vitjaði hann felagið saman við øðrum fjepparum, fyri at kenna veruliga rákan av stórleika og snildi í sálini. Honum dámdi ikki royk og royking, og mundi vera tann fyrsti á tingi, sum veruliga fór undir at berjast ímóti tí óvananum, hetta forðaði honum tó ikki í at ironisera um problematikkin. Hugsi um ta ferðina, hann á fótbóltsferð saman við Kristiani Magnussen hevði keypt mær eina so stóra grøna Rizla bók til Samson tubakki, at hon treyðugt fekst inn um dyrnar. Helst vildi hann við hesum átaki vísa mær hvussu tápuliga atferð eg hevði í hesi vandamiklu lívsnjótan. Eitt extravagant slag av pedagogikki frá hansara síðu.

Tað kom mær dátt við táið eg í summar, staddur í Provence dalinum, í syðru síðu á meginfjallarøð Europu, Alpunum, hoyrdi um, at tú var álopin av hesi herviligu sótt, sum nú gjørdi enda á tínum jarðiska likami. Slerdi uppá tráðin og lagið var rímiligt. Hóast forsagnirnar eru daprar um júst álop av hesum slagi, sum tú nú varð herjaður av, so misti tú ongantíð vónina. Á Ólavsvøku sá ikki væl út. Ein nógv tódnað kempa við ringum dæmi. Lívsneistin var tó áhaldandi hin sami. Tað var so nógv tú vildi gera fyri tíni, Barnaheimið, flokkin og tjóðina. Tú fór um allan knøttin eftir alternativari hjálp, táið onki annað bar til á okkara leiðum. Ein einmansherur á fjakkaraferð við deyðanum í hølunum. Áhaldandi við vónini sum játtandi fylgisveini. Fríggjamorgunin mundi Skapari himins og jarðar tó halda líðingina hava vart nóg leingi. Hann lat hamin falla og flutti sálina inn í sínar ævigu bústaðir.

Finnur Helmsdal, eg sakni teg sáran. Sakni títt bjarta vit, tína komplexu bræðing, tína ósnobbutu medferð, títt robusta temperament, títt stutta fjús, tínar greiðu meiningar, títt skilvísi, tína ókompromitteraðu ærligheit, títt ómetaliga rættskafni, tín stríðsvilja og tín stálsetta kompromisleysa vilja, táið tað galt at verja tey minni mentu, tey sum livdu á lívsins skuggasíðu og tí at tú fór ígjøgnum heilt fyri at stuðla teimum minnilutum, sum ikki høvdu ájavna verju við onnur í samfelagnum. Og so sakni eg eisini láturin, sum kundi runga, táið tað góða lagið var. Tú átti eisini tann vælsignaða góða lutin, at vera sjálvironiskur. Lívsjáttandi eginleikin fram um aðrar.

Finnur Helmsdal var giftur Jóruni hjá Samson í Vestmanna og tey eiga børnini Olgu, Mikkjal, Samson og Olivur. Og lat meg ikki gloyma hin lítla Finn, sum hevði ein heilt serligan leiklut í lívinum hjá abbanum. Týsdagin verður tú lagdur í mold bara 56 ára gamal. Ófatiligt, í mun til mannin, sum við høvdi og kroppi megnaði at verja seg fyri so mongum álopum í pulserandi gerandisdegnum, á fleiri mótum, og nú, táið tú vápnaleysur varð álopin innanífrá – ja, tá gjørdist onki. Sjálvt vísindin stóð hjálparleys. Hesumegin markið millum lív og deyða er bara eftir at takka tær fyri frágerða gott samstarv, gott vinalag, nógvar djúptøknar samrøður, góð ráð og gott politiskt handalag, sum ivaleyst fer at vera Føroyum til dugnað, eisini í tíðini sum kemur. Tú sáddi tað, ið onnur fara at heysta. Serliga hin veikari parturin av tjóðini hevur altíð tørv á umboðsmonnum og slóðarum sum Finni á ovastu rók, har fæið og umfordeilingin skal raðfestast og skipast. Skal samfelagið ikki dragna og misfarast. Tað verið seg í heimastýrinum sum í komandi republikkini.

Mátti Harrin styrkt øll tykkum, sum nú sita eftir í ófatiligu sorgini, ið má níva í mønu og merg. Og tó, líka so náðileyst alt kann tykjast, líka so stór er troystin, sum fæst, har hon finst. Og ríkið tykkum lívið við mongu góðu minnunum um merkismannin Finn Mikkjalsson Helmsdal. Mátti hin Alvaldandi tikið sær væl av mínum góða vini og politiska lagsbróðuri.

Ein skansi er fallin og tjóðin syrgir sáran ein lívlátnan vegara.